# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 03-02-2022

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**
(Umlegging av nøgdum latnar til vinnuligar royndir og verkætlanir til egnar árskvotur og at lata kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir (ískoytiskvotur) fylgja við, tá ið fiskifar verður skift út)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 2020, løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr.185 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 186 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 70 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2021 og løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 14, 3. pkt. verður aftan á "§ 10, stk. 3" sett: "ella § 49, stk. 4".

**2.** Í § 15, stk. 3 verður aftan á "stk. 1" sett: "og 2".

**3.** Í § 15, stk. 3 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Umløgdu kvoturnar verða stillaðar sambært § 16."

**4.** Í § 49, stk. 2 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Landsstýrismaðurin kann, eftir umsókn, í tilsagnartíðarskeiðinum loyva, at kvota, latin sambært hesum stykki, kann verða flutt á annað fiskifar, sum eigarin útvegar sær ístaðin."

**5.** Í § 49, stk. 4 verður aftan á 3. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Verður lagt um til egnar árskvotur, verður mongdin tikin av nøgdini sambært § 14 og § 15, stk. 1 og 2."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**1.1. Orsakir til uppskotið**
Lógaruppskotið verður lagt fram fyri at gera tvær tillagingar í sjófeingislógini. Onnur er at nágreina ásetingarnar um, hvat skal roknast við í nøgdirnar, tá ið kvotur av uppsjóvarfiski til vinnuligar royndir og verkætlanir verða lagdar um til egnar árskvotur. Hin snýr seg um at broyta lógina soleiðis, at um eigari av fiskifari, sum hevur fingið játtað ískoytiskvotu, skiftir hetta fiskifarið út, skal tað í ávísum førum bera til at flyta ískoytiskvotuna á nýggja fiskifarið.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Í galdandi lóg eru reglur um, hvussu kvotur, sum eru settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir, herundir kvotur at brúka til at styrkja um kvotugrundarlagið hjá fiskifari (ískoytiskvotur), kunnu leggjast um til vanligar egnar árskvotur.

Løgtingið broytti í desember 2021 heimildina hjá landsstýrismanninum at leggja kvotur, ið eru latnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, um til egnar árskvotur, soleiðis at veittar tilsagnir um ískoytiskvotur kunnu leggjast um longu frá 2022, ímeðan aðrar tilsagnir í fyrsta lagi kunnu umleggjast frá 2023. Avgerð um umlegging kann takast, um mett verður, at m.a. grundarlag er fyri framhaldandi og burðardyggum fiskiskapi, og um treytirnar í loyvinum annars hava verið loknar.

Grundarlagið undir kvotunum, ið eru latnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, er kvota við støði í grein 14 og grein 15, stk. 1, og fyri norðhavssild eisini við støði í grein 15, stk. 2.

Skipanin er, at allar nøgdirnar við ymiskum uppruna eru lagdar saman í eina samanlagda nøgd og síðani latnar út til ymisku verkætlanirnar. Sostatt hevur hvør einstøk verkætlan, sum hevur fingið tillutað makrel og svartkjaft, kvotu við uppruna í grein 14 og grein 15, stk. 1, ímeðan verkætlanirnar, ið hava fingið tillutað norðhavssild, harumframt eisini hava uppruna í grein 15, stk. 2.

Verandi grein 15, stk. 3 ásetir, at verður lagt um til egnar árskvotur, verður nøgdin til umløgdu rættindini tikin av nøgdini sambært grein 15, stk. 1. Tilvísingin er sostatt bert til nøgdirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum eru undir mørkunum í grein 15, stk. 1.

Hildið verður ikki, at verandi orðing í grein 15, stk. 3 er ein tilætlað avmarking fyri, hvørjar nøgdir kunnu umleggjast. Heldur er talan um, at ein fyrst í 2020 ikki hevði møguleika at vita, at nøgdir frá grein 14 fóru at verða tøkar til vinnuligar royndir og verkætlanir. Tá vóru allar menningarkvotur ikki lagdar um til egnar árskvotur. Freistin at gera tað var ikki fyrr enn 1. januar 2022. Ein tykist heldur ikki at hava givið sær nóg væl far um, at fyri norðhavssildina er grein 15, stk. 2 eisini grundarlag undir nøgdum til vinnuligar royndir og verkætlanir. Í 2020 var heildarkvotan oman fyri markið upp á 85.000 tons í grein 15, stk. 1.
Tí er tørvur á at tillaga grein 15, stk. 3 í lógini soleiðis, at tað er greitt, at nøgdirnar, sum verða lagdar um, skulu takast frá øllum teimum kvotum, ið eru latnar til verkætlanina, t.v.s. at umframt at vísa til § 15, stk. 1, skal eisini vísast til § 15, stk. 2.

Eitt annað lógarøki, sum tørvur er á at tillaga, eru ásetingarnar um kvotur, ið eru latnar fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskifari sambært § 49, stk. 2 (ískoytiskvota). Eftir verandi lóg ber ikki til at flyta slíka kvotu á eitt annað fiskifar, sum sami eigari útvegar sær, og hetta kann gera, at skipaeigarin ikki kann menna raksturin, eitt nú við at útvega sær annað og betri fiskifar.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Endamálið við uppskotinum er at broyta sjófeingislógina soleiðis, at lógarkarmarnir fyri at umleggja kvotur, ið eru latnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, til egnar árskvotur, verða greiðari og neyvari, og at gera tað møguligt at flyta ískoytiskvotu, latin ávísum fiskifari, á annað fiskifar, sum sami eigari útvegar sær.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Uppskotið fatar um tvær broytingar í sjófeingislógini.
Tann fyrra er at siga neyvari, at tá kvota av svartkjafti, norðhavssild og makreli, sum er latin til vinnuligar royndir og verkætlanir, verður løgd um til egna árskvotu, skal nøgdin at leggja um roknast av *allari* kvotunøgdini, ið er latin til verkætlanina. Uppskotið broytir ikki verandi kvotugrundarlag hjá teimum, sum hava kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir, men tryggjar, at kvotugrundarlagið ikki broytist, tá lagt verður um til egnar árskvotur.

Eftir lógini hava nøgdirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir uppruna í tveimum ásetingum. Grein 14 ásetir, at 8,5 prosent av føroysku kvotunum av ávikavist svartkjafti, norðhavssild og makreli verða sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Menningarkvotur, sum í 2018 og 2019 vóru latnar eftir undanfarnu løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, verða roknaðar av hesi nøgd. Flestu menningarkvotur eru lagdar um til vanligar egnar árskvotur innan lógarásettu freistina 1. januar 2022. Men har er framvegis ein minni partur eftir, sum ikki er umlagdur, og sum frameftir skal brúkast til vinnuligar royndir og verkætlanir, ið eru skipaðar sambært grein 49 í lógini.

Í verandi grein 14 er ikki lagt upp fyri, at ein partur av nøgdunum, ásettar har, skal brúkast til vinnuligar royndir og verkætlanir, og skal takast við, tá lagt verður um eftir grein 49. Við hesum lógaruppskoti verður neyvari sagt, at tær nøgdir, sum stava frá grein 14, eisini skulu telja við, tá nøgdir, ið eru latnar eftir grein 49, verða lagdar um.

Umframt eftir grein 14 verða nøgdir av svartkjafti, norðhavssild og makreli til vinnuligar royndir og verkætlanir eisini ásettar eftir grein 15. Har er grundarlagið kvoturnar í 2020. Nøgdirnar til verkætlanir vóru tá settar alt eftir, um heildarkvotan var oman fyri ella niðan fyri ásettu mørkini í § 15, stk. 1. Í 2020 vóru heildarkvoturnar av makreli og svartkjafti niðan fyri mørkini, tí vórðu nøgdirnar roknaðar sum ávikavist 8,7 og 14,8 prosent av heildarkvotunum.

Heildarkvotan av norðhavssild í 2020 var hinvegin oman fyri markið upp á 85.000 tons. Samlaða nøgdin av norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir var sett saman av tí, sum samsvarar við 8,7 prosent av heildarkvotuni (grein 15, stk. 1) og allari nøgdini, ið var oman fyri markið (grein 15, stk. 2). Samlaða nøgdin av norðhavssild at seta av í 2021 var stillað eftir ásetingunum í grein 16 í lógini.

Tá nøgdin verður lutað út til vinnuligar royndir og verkætlanir eftir grein 49, verður í tilsøgnunum ikki skilt ímillum uppruna. Allar tøku nøgdirnar frá grein 14 og nøgdirnar í grein 15 vera lagdar saman í eina samanlagda nøgd. Kvotur, ið eru latnar eftir grein 49, kunnu leggjast um til egnar árskvotur, men ikki hevur verið nóg greitt, hvat skal telja við í grundarlagið fyri umleggingini. Við hesum uppskotinum verður lógarteksturin tillagaður, so hann neyvari sigur, hvat skal roknast upp í nøgdina at leggja um. Tað vil siga, at nøgdir til vinnuligar royndir og verkætlanir, verða roknaðar á sama hátt áðrenn umlegging sum eftir umlegging.

Hin lógarbroytingin er, at tað skal bera til at lata ískoytiskvotu fylgja við, tá eigari av fiskifari við ískoytiskvotu skiftir sítt fiskifar út við eitt annað. Mett verður, at hetta kann stuðla undir góðan rakstur.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnuráðnum, Vørn og Felagnum Trolbátar. Harumframt hevur uppskotið ligið á hoyringarportalinum hjá landsstýrinum.
......................................
......................................

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur. Hinvegin kann uppskotið hava umsitingarligar avleiðingar fyri landið, tí hetta hevur við sær nýggjar og øðrvísi uppgávur fyri umsitingina.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið er gagnligt fyri tann partin av vinnuni, ið hevur kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, og sum leggur tær um til egnar árskvotur. Broytingarnar gera, at lógin verður orðað neyvari, so tað er greitt, at tað er øll nøgdin, ið er latin til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum verður roknað uppí, tá lagt verður um til egnar árskvotur, óansæð hvaðani nøgdirnar upprunaliga stava frá. Mett verður eisini, at møguleikin at flyta ískoytiskvotur millum fiskifør gevur rúmari møguleikar at skipa vinnuliga virksemið.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Millumtjóðasáttmálar eru ikki á teimum økjum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, harundir Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at uppskotið elvir til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella størri inntriv í rættindini hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið áleggur ikki heimildir til annan landsstýrismann, stovn ella kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**

**Til nr. 1**
*§ 14, 3. pkt.*
Eftir 1. pkt í grein 14 í sjófeingislógini verða 8,5 prosent av føroysku kvotunum av ávikavist svartkjafti, norðhavssild og makreli sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Menningarkvotur, sum vóru latnar eftir undanfarnu lóg um fyrisiting av sjófeingi í 2018 og 2019, og sum vóru í gildi, tá galdandi sjófeingislóg tók við 1. januar 2020, verða roknaðar av hesi nøgd. Meginparturin av menningarkvotunum er lagdur um til egnar árskvotur samsvarandi freistini og mannagongdum í grein 10, stk. 3 í lógini. Men ikki øll 8,5 prosentini, sum eru brúkt til menningarkvotur, og heldur ikki allar játtaðar menningarkvotur, eru umlagdar. Tí er eitt avlop, sum – saman við nøgdunum frá grein 15 – verður brúkt til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært grein 49 í lógini.

Kvotur, ið eru latnar til vinnuligar verkætlanir eftir grein 49, kunnu eisini leggjast um til vanligar egnar árskvotur. Men verandi orðing í grein 14 leggur ikki upp fyri, at ein partur av grein 14-nøgdunum fer til vinnuligar royndir og verkætlanir, og er tí partur av tí, sum kann leggjast um.

Fyri at gera lógartekstin neyvari, verður sett afturat triðja punktum, at tá nøgdin í grein 14, ið ikki er játtað sum menningarkvota ella tillutað menningarkvota, sum ikki er umløgd sambært grein 10, stk. 3, verður løgd um eftir grein 49, stk. 4, verður hendan mongdin tikin av samlaðu nøgdini í grein 14.

**Til nr. 2 og 3**
*§ 15, stk. 3*
Eftir lógini verður ein partur av nøgdunum av svartkjafti, norðhavssild og makreli til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49 ásettur eftir grein 15. Har er útgangsstøðið kvoturnar í 2020. Tá vórðu nøgdirnar settar alt eftir, um heildarkvotan var oman fyri ella niðan fyri lógarásettu mørkini í grein 15, stk. 1. Í 2020 vóru heildarkvoturnar av makreli og svartkjafti niðan fyri mørkini. Tí vórðu nøgdirnar roknaðar sum ávikavist 8,7 prosent og 14,8 prosent av teimum heildarkvotunum. Hinvegin var heildarkvotan av norðhavssild í 2020 oman fyri markið upp á 85.000 tons. Nøgdirnar av norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir verða tí ásettar við at taka 8,7 prosent av heildarkvotuni (grein 15, stk. 1), og at leggja tað saman við allari nøgdini av heildarkvotuni, sum er oman fyri markið (grein 15, stk. 2).

Fyri norðhavssildina eru stillingarnar árini aftan á 2020 tongdar at, um heildarkvotan er størri ella minni, enn heildarkvotan var í 2020. Hesar stillingarnar verða gjørdar eftir ásetingunum í grein 16, stk. 3 og 4. Er heildarkvotan tann sama, ella størri enn heildarkvotan var í 2020, verða nøgdirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir stillaðar í sama lutfalli, sum heildarkvotan broytist. Er heildarkvotan hinvegin minni, enn heildarkvotan var í 2020, verða ta nøgdirnar, ið eru settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 15, stk. 2, sum detta burtur fyrst.

Grein 15, stk. 3 í galdandi lóg ásetir, at verður lagt um til egnar árskvotur eftir grein 49, stk. 4, verður mongdin tikin av nøgdini sambært grein 15, stk. 1. Tað vil siga, at tonsini av norðhavssild, sum stava frá grein 15, stk. 2 (t.e. nøgdin av heildarkvotuni oman fyri markið),

og sum eru partur av samlaðu nøgdini, ið verður latin til vinnuligar royndar og verkætlanir sambært grein 49, ikki skulu roknast uppí, tá lagt verður um til egnar árskvotur.

Mett verður ikki, at hetta er ein tilætlað avmarking í sambandi við umlegging til egnar árskvotur. Tí verður skotið upp at broyta grein 15, stk. 3 soleiðis, at nøgdirnar sambært grein 15, stk. 2 eisini skulu takast við, tá kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært grein 49, stk. 4 verða lagdar um til egnar árskvotur.

Fyri at gera ásetingarnar neyvari er harumframt skotið upp at seta inn í grein 15, stk. 3, at umlagdar kvotur við uppruna sambært § 15, stk. 1 og 2 verða stillaðar eftir ásetingunum í grein § 16.

**Til nr. 4**
*§ 49, stk. 2*
Kvotur eftir grein 49, stk. 2, vanliga nevndar ískoytiskvotur, eru latnar ávísum fiskiførum fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá júst hesum førum. Kvoturnar eru latnar við tilsøgn í eitt 5 ára tíðarskeið og kunnu í hesum tíðarskeiðinum ikki verða avhendaðar ella lagdar á eitt annað fiskifar.

Við hesi broytingini fær landsstýrismaðurin heimild at loyva, at ískoytiskvotan í tilsagnartíðarskeiðinum (t.v.s. áðrenn kvotan er umløgd til egna kvotu) kann verða flutt á eitt annað fiskifar, um fiskifarið, sum kvotan var játtað til, verður selt, og felagið keypir annað fiskifar ístaðin. Talan er bert um føri, har fiskifarið verður skift út við annað fiskifar, sum er ført fyri at gagnnýta ískoytiskvotuna.

Í sambandi við viðgerðina av umsóknum skal ítøkiliga metast um, hvørt ætlaða flutta ískoytiskvotan fer at styrkja kvotugrundarlagið hjá nýggja fiskifarinum. Endamálið er framvegis, at talan skal vera um styrk til teir skipaeigarar í vinnuni, sum ikki hava eitt nóg stórt kvotugrundarlag til at skipa verandi rakstur av ávísum fiskifari.

**Til nr. 5**
*§ 49, stk. 4*
Hendan orðingin verður sett inn fyri neyvt og greitt at siga, at tá kvota, sum er latin til vinnuligar royndir og verkætlanir eftir grein 49, er løgd um til egnar árskvotur, verður nøgdin tikin av tí, ið er tøkt eftir greinunum 14 og 15. Umlagdar kvotur koma tí frameftir at verða ásettar eftir, hvussu tøku nøgdirnar í nevndu lógargreinum hátta sær.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Árni Skaale**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert